# Vegleiðing til broyta navn og loyniorð á Fritz!Box routara

Tøppa inn **‘192.168.178.1’** í kagarin




Loyniorðið til routaran og tær tráðleysu upplýsingarnir finnur tú á einum lepa aftanfyri á routaranum.



Trýst á teir 3 prikkarnir ovast í høgra horni




Flyt knøttin í *Advanced View* so hann verður grønur - hetta gevur tær fleiri møguleikar at broyta innstillingar.



Far síðani inn á **Wireless**

- FritzBox beinarin er uppsettur til at bæði tráðleysu netini, 2.4 GHz og 5GHz, brúka sama navn. Hetta kanst tú broyta, um tú ynskir tað.

1. Trýst á **Radio Network**
2. Her kanst tú sløkkja/tendra fyri 2.4 GHz netinum og broyta navnið á tí
3. Her kanst tú sløkkja/tendra fyri 5 GHz netinum og broyta navnið á tí




Trýst síðani á **Radio Channel**

1. Her hevur tú møguleika at broyta kanalina, ið beinarin hjá tær brúkar
2. Lat prikkin standa í hesum, um tú vilt hava at beinarin sjálvur skal velja kanalina
3. Set prikkin í *Adjust radio channel settings* um tú sjálv/ur vilt velja kanalina. Vit viðmæla at man letur beinaran finna út av kanalini.



Niðast á somu síðu sært tú tvey yvirlit yvir aðrar beinarar í nærumhvørvinum og hvørjari kanal teir senda á. Hetta kann hjálpa tær við at velja eina kanal, ið ikki hevur ov nógvar signal órógvingar.

**Kanal skan**

- Her hevur tú yvirliti á 2.4 GHz og 5GHz bandinum. Grøna linjan vísir hvørja kanal tín beinari brúkar, meðan tann bláa vísir hvørjar kanalir aðrir beinarir nýta.




**Tráðleyst yvirlit**

- Her sært tú yvirlit yvir tráðleys net í nærumhvørvinum og júst hvørjari kanal hvørt net koyrir á.



**Broyt loyniorðið**

1. Lat prikkin standa í *WPA-encryption (highest security)* fyri at hava loyniorð á tykkara tráðleysa netið.
2. Fyri at broyta loyniorðið skulu tit bert skriva eitt nýtt í tegin *Network key*og trýsta á **Apply** niðast á síðuni.
   Vit viðmæla at man brúkar standard loyniorðið, ið beinarin kom við ella eitt trygt loyniorð við tølum og stavum.



Soleiðis fáa tínar eindir samband

## Windows 7/8/10

Trýst á tí tráðleys



ímyndina niðast í høgra horni, og vel títt tráðleysa net. Skriva tað tráðleysa loyniorðið inn og trýst á **Opret**.




## Mac

Trýst á tí tráðleysu ímyndina ovast í høgra horni á skerminum og vel títt tráðleysa net. Skriva tað tráðleysa loyniorðið inn og trýst á **Opretforbindelse**.




## iPhone/iPad

Far inn á **Indstillinger**, og trýst á **WiFi.** Vel títt tráðleysa net, og skriva loyniorðið inn.



## Android

Far inn a **Indstillinger og trýst á WIFI**. Vel títt tráðleysa net, og skriva loyniorðið inn og trýst á **Opret**.

